# Fulltrúi til Kappingareftirlitið og Fjarskiftiseftirlitið

Søkt verður eftir einum fulltrúa til Kappingareftirlitið og Fjarskiftiseftirlitið. Kappingareftirlitið og Fjarskiftiseftirlitið eru fyrisitingarliga skipað saman við Posteftirlitinum, Tryggingareftirlitinum, Elveitingareftirlitinum og Skráseting Føroya.

Vit kunnu bjóða eitt sera fjøltáttað og sjálvstøðugt starv við avbjóðandi uppgávum við stórum týdningi fyri vinnu og borgarar. Starvið er persónliga og yrkisliga mennandi, umframt er møguleiki fyri nógvum samskifti við vinnulív, altjóða myndugleikar og aðrar myndugleikar í Føroyum.

Tú kemur at starvast í einum óformligum og dynamiskum arbeiðsumhvørvi. Denturverður lagdur á, at tað arbeiði, ið latið verður úr hondum, er á høgum fakligum støði. Tískil eggja og stuðla vit starvsfólkum okkara at menna sínar førleikar á viðkomandi økjum.

**ARBEIÐSUPPGÁVUR**

**Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um:**

- At innsavna tilfar og gera búskaparligar greiningar á fjarskiftisøkinum.
- At gera ymiskar marknaðargreiningar fyri Kappingareftirlitið.
- At luttaka í málsviðgerðini av málum.

**FØRLEIKAR**

**Vit vænta at tú hevur:**

- Viðkomandi búskaparfrøðiliga kandidat-útbúgving, , t.d. cand. oecon. ella cand. polit. Lesandi á kandidatstigi, ið eru við at verða liðug við útbúgvingina, eru eisini vælkomin at søkja.
- Góð analytisk evni.
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og í toymi, alt eftir hvør uppgávan er.

**SETANARTREYTIR**

Setanartreytir verða eftir galdandi sáttmála við BLF ella annað avvarðandi fakfelag. Setanin umfatar Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

Umsókn, saman við prógvum og møguligum ummælum, skal sendast til:

Kappingareftirlitið
Skálatrøð 20
Postboks 73
FO-110 Tórshavn

og verða stovninum í hendi í seinasta lagi tann 30. juni 2010, kl. 12.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Terja Sigurðsson, deildarstjóra, á tlf. 35 60 41 og t-post: terjes@kapping.fo ella við Sigurd Rasmussen, fulltrúa, á tlf: 35 60 44 og t-post: sigurdr@kapping.fo

Kappingareftirlitið www.kapping.fo www.fse.fo Fjarskiftiseftirlitið



OKKARA Føroyar

# Søkt verður eftir **maskinmanni** til bryggjaríið OKKARA

OKKARA søkir eftir einum maskinmanni at byrja sum skjótast. Arbeiði umfatar alt vanligt viðlíkahald og ábøtur á bryggjarínum.

Bryggjaríið umfatar eina bryggjhøll, tappihøll og eitt lagur, ið hvør í sær hava tekniska útgerð á høgum tekniskum støði.

Útyvir maskinarbeiði kemur starvið eisini at umfata luttøku í vanliga arbeiðinum á bryggjarínum, so sum at passa teknisku útgerðina tá ið framleitt verður.

Nærri um starvið fæst at vita við at ringja til Wilhelm Petersen á telefon 281530 ella senda ein t-post til wp@okkara.fo

Umsóknir skulu vera inni skjótast gjørligt og verða at senda til:

**OKKARA** Velbastaðvegur 30, Postsmoga 26, 176 Velbastaður



Nú kanst tú søkja um

# Stuðul til gransking

sansir.fo

**Stuðul verður latin:**

- føroyskum granskarum og granskaralesandi
- gransking og menning á ella í tilknýti til føroyskar granskingar stovnar og vinnufyritøkur
- gransking og menning, ið hava týdning í føroyskum høpi

**Stuðul verður latin til ymisk sløg av verkætlanum:**

- Ph.D.-verkætlanir
- post grad. ella post doc. verkætlanir, ið ganga um fleiri ár
- smærri verkætlanir við styttri tíðarætlan
- granskingarverkætlanir, sum fevna um vinnumenning og vinnugransking

**Tað er ein fyrimunur at:**

- verkætlanin fevnir um samstarv millum fleiri granskarar
- verkætlanin fevnir um samstarv millum granskarar, granskingarumhvørvi og vinnuna

**Tað verður kravt at:**

í minsta lagi 1/3 verður fíggjaður av øðrum enn Granskingargrunninum. Undantak kann tó gerast fyri Ph.D. verkætlanir.

Minstamark fyri stuðli til verkætlanir er 80.000 kr.

Umsóknir skula skrivast á skandinaviskum ella enskum máli á serligt oyðublað, ið fæst á skrivstovu ráðsins og kann heintast á heimasíðuni. Skrivlig vegleiðing fæst á somu støðum.

Gevið gætur, at umsóknir skulu sendast við telduposti. Sí nágreinilig krøv á gransking.fo.

**Umsóknarfreist er:**

1. september 2010, kl. 12.00 føroyska tíð. (Í 2011 verður árliga umsóknarfreistin flutt fram til 15. februar)

Umleið 7 mió kr. eru tøkar til nýggjar verkætlanir.

**Granskingarráðið hevur tvey høvuðsarbeiðsøki:**

- at ráðgeva landsstýri og vinnu í granskingarpolitiskum spurningum
- at umsita Granskingargrunnin, sum veitir fígging til gransking og menning

granskingarráðið THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

Granskingarráðið · Postrúm 259 · FO-110 Tórshavn
Tel 56 78 00 · www.gransking.fo · gransking@gransking.fo



# Internet Sosialurin
# www.sosialurin.fo